Sjálvstýrisflokkurin

Landsstýrismálanevndin
Tinghúsvegur
100 Tórshavn

10. mars 2008

**Evni: Viðgerð landsstýrismansins í almannamálum av portørmáli**

Góðu tit,

Vísandi til § 38 í stýrisskipanarlógini og § 2 í starvsskipan nevndarinnar heiti eg við hesum á landsstýrismálanevndina um at taka nevnda mál til viðgerðar.

Kunnleiki mín til málið er fyrst og fremst grundaður álit, ið løgtingsins umboðsmaður hevur gjørt (mál 63 í 2007).

Sum skilst er talan upprunaliga um, at tveir starsmenn hjá sjúkrabilatænastuni vóru farnir eftir sjúklingi. Óheft av støðuni hjá sjúklinginum valdi annar teirra í góðum starvbrøðraligum anda at geva hinum ábreiðslu um almennu tilbúgvingina hjá viðkomandi. Í slíkari tænastu, har standast kann um lív í knappari vending, er týðandi at starvfelagar eru opnir og erligir, so tilbúgvingin altíð er dagførd um umhugsað.

Men avleiðingin í hesum føri gjørdist, at báðir starvsfelagarnir vórðu sagdir úr starvi fyribils og málið tikið upp sum mál um aga (disciplinermál) í samband við tiltak teirra tann dagin, og ábreiðslan tulkað sum ítøkilig ábreiðslan um atburðin júst ta ferðina. Málið gerst rættiliga ógvusligt í fjølmiðlaviðgerð, tí sjúklingurin í málinum varð deyður, og hendingin kundi tulkast sum tengdt at ábreiðsluni og ábyrgdandi fyri portørarnar.

Málið er viðgjørt bæði á landssjúkrahúsinum og í stjórnarráði undir landsstýrismanninum Hans Paula Strøm.

Løgtingsins umboðsmaður átalar í áliti sínum almanna og heilsumálaráðið (AHR), ið landsstýrismaðurin stendur til svars fyri mótvegis løgtinginum, fyri:

- At málið ikki er nøktandi upplýst.
- At ábreiðslan móti øðrum portørinum "eftir øllum at døma [er] slept"
- At so stórur ivi er um, hvat farið er fram, at niðurstøðan hjá AHR tí er ivasom.
- At rætturin at verða hoyrdur, serliga at sleppa á fund, áðrenn avgerð verður tikin, ikki er virdur.
- At rætturin til umboðan ikki er nøktandi virdur, tí ivasamt er, hvørt sama umboð kann umboða teir báðar.
- At AHR ikki metti nakra nyttu vera í at hitta viðkomandi á fundi.
- At skorið verður yvir ein kamb í málinum hjá báðum starvsfeløgunum.
- At hetta samanlagt gevur grundarlag fyri átalu.

Sjálvstýrisflokkurin

Løgtingsins umboðsmaður heitir síðani á AHR um “at taka málið uppaftur til viðgerðar við atliti at spurninginum, hvørt grundarlag veruliga var fyri uppsøgn av teimum báðum portørunum.”

Ikki ber til hjá mær at taka dagar ímillum, hvat fyrifórst, men landsstýrismálanevndin hevur frægari heimildir og umstøður sambært stýrisskipan og starvsskipan síni at kanna faktisku umstøðurnar. Ætlanin er eyðvitað ikki at fáa nevndina at kanna sjálvan spurningin um sjúkrabilsflutningin, uttan heldur at kanna fyrisitingarligu viðgerðina av málinum, serliga spurningin um ikki landsstýrismaðurin átti at tryggja, at málið fekk nøktandi loysn.

Nú frættist, at landsstýrismaðurin hevur latið málið taka ta vend, at starvsfelagarnir báðir verða løntir, men ikki settir í starv aftur, og mál teirra verður enn einaferð kannað av nýggjum av uttanhýsisfólki.

Hetta tykist óheppið, tí tann stóra óvissa, ið umboðsmaðurin leggur dent á, tann ovurlanga viðgerðartíðin, tann sera stóra byrðan at vera suspenderaður vegna kanning av máli, ið ógvulsiga verður lýst í miðlunum, og manglandi møguleikin fyri at tann upprunaligu starvsbrøðraligu átalan kann føra við sær so ógvusligar agafylgjur, kunnu neyvan føra til aðra niðurstøðu enn, at landsstýrismaðurin má tryggja, at málið endar og portørarnir fáa høvi at røkja størv síni aftur – ella, um óvæntað grundarlag er fyri tí, at portørarnir sum skjótast fáa at vita, hvør endaliga agarevsingin verður.

Serliga er at undrast á, hví landsstýrismaðurin sum ovasti embætismaður á økinum, tá ið frættist um málið, ikki tekur málið upp og syrgir fyri fullgóðari loysn.

Hvørt grundarlag er fyri ábreiðslu mótvegis landsstýrismanninum, tykist tó uttanfyri mínar møguleikar at kanna; og at seta antin munnligan ella skrivligan fyrispurning á tingi kann bæði óneyðuga órógva viðkomandi fólk og eisini í svarinum verða merkt av, at málið antin als ikki ella illa kann lýsast á tingsins røðarapalli.

Tí henda áheitan á nevndina um at taka málið upp til viðgerðar.

Vinarliga

Kári á Rógvi,
løgtingsmaður